# Føroya Bjór Simultan

**Símunn Lassaberg og Eyðun Anthoniussen gjørdust bestir samanlagt, tá árliga Føroya Bjór simultan kappingin í Brigde varð leikt um vikuskiftið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Síðsta leygardag var tann árliga Føroya Bjór Simultan kappingin í bridge hildin. Luttøkan var stór, tilsamans luttóku 104 spælarar. Leikt var á hesum støðum: Tórshavn, Eysturoy, Vágum, Klaksvík og Suðuroy.

Føroya Bjór Simultan var soleiðis skipað, at allir luttakarnir spældu somu spøl, har av 27 tey fyrstu spølini taldu við uppá landsbasis. Ein vinnari varð funnin fyri hvørt spælistaðið, og síðani varð ein samlaður vinnari funnin.

Tey sum vunnu á teimum ymsu spælistøðinum:

**Tórshavn**
Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen, Eysturoy
Símin Lassaberg - Eyðun Anthoniussen
**Vágar**
Josta Olsen - Verna Rasmussen
**Klaksvík**
Randi Jacobsen - Álvur Klakk
**Suðuroy**
Knútur Nygaard — Áki Dimon

Eftir at øll úrslitini frá teimum ymsu spælistøðinum vóru latin kappingarleiðarinum hjá Føroya Bridgesamband, varð endaliga støðan funnin, og vit skulu her vísa pørini, sum vóru yvir miðal:

**Nr. Pør Stað Stig**
1 Símin Lassaberg - Eyðun Anthoniussen, Eysturoy 926
2 Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen Tórshavn 865
3 Jens Jacobsen - Karl Isaksen, Klaksvík 855
4 Randi Jacobsen - Álvur Klakk, Klaksvík, 829
5 Magni Jøkladal - Robert Langgård, Eysturoy 819
6 Knút Joensen - Áki Dimon, Suðuroy 802
7 Hans Jacob Petersen - Arnbjørn Sivertsen, Tórshavn 797
8 Hans Joensen - Birgir Jacobsen, Suðuroy 786
9 Poul J. Joensen - Hannemann Muller, Suðuroy, 784
10 Jákup Hjaltalin -Dia Poulsen, Suðuroy 783
11 Óli Holm - Páll Augustinussen, Suðuroy 780
12 Jens Pauli G. Nolsøe - Høgni Hansen, Tórshavn 778
13 Julian Olsen - Hanus Bærentsen, Vágar 771
14 Allan Dal-Christiansen - Jón Andreassen, Tórshavn 761
15 Jóan Hendrik - Jóhann, Vágar 760
16 Marner Joensen - Edmund Joensen, Eysturoy 755
17 Gunnvør - Ruborg, Vágar 746
18 Sámal P. Johannesen - Niclas Ludvig, Suðuroy 744
19 Egil Helmsdal - Carl Mikkelsen, Tórshavn 744
20 Hans Egil Joensen - Dia Petersen, Eysturoy 743
21 Høgni Vesturklett - Gunnar Mouritsen, Tórshavn 729

Fyri at vinna eina kapping sum Føroya Bjór Simultan, er neyðugt at hava nógvar stórar toppar. Her er ein hjá parinum, ið gjørdist nr. 2 samanlagt.

E/E-V A95
K9543
J72
93
-
KQ108763
Q1085 J7
Q10764 K6
Q107642 J8
J42
Q102
A943
AK5

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Rói á Rógvu Joensen | | Bogi Simonsen | |
| - | - | - | 3hj* |
| pass | 3sp | pass | pass |
| D | pass | pass!! | pass |

* Sperr í spaðara, konventiónin eitur Verdi.

Meldingarnar eru sera áhugaverdar. Sjálvur meti eg ikki, at Eystur skal sperrimelda í fyrstu hond, einsamallur í hætti við trimum doubletons, er hondin ikki egnað til meldið. Rói meldaði pass, sjálvt um hann hevði 14 hp, eitt gott meld! Vestur meldar 3 sp, sum hann skal, og pass kemur runt aftur til Róa, ið nú velur at koma við einari seinkaðari upplýsingardupling, aftur eitt gott meld. Nú er tað so Norðan, ið hevur trupulleikan - skal hann melda 4hj ella pass? Valið fall á pass, sum vísti seg at vera frálíkt. 3sp varð settur tvær ferðir til 500 og ein reinan topp til NS.

Nógvir toppspælarar í heimselituni hava tað motto, tá ið teir spæla parakapping, um teir ikki dupla minst eina deilkontrakt, ið vinnur, hava teir ikki dupla nóg ofta!

Neistin-VB 19-23 (9-11):

# Sama søgan

**Fyri aðru ferð innan tveir dagar tepti Neistin fyri VB, og tó at munurin ikki var tann stóri, so var veruligur ivi ikki um endaliga úrslitið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Neistin og VB høvdu dupultuppgerð um vikuskiftið. Leygardagin vóru havnarkvinnurnar í Vági, har seinna hálvfinalan millum liðini varð avgreidd, og sunnudagin var tað so VB, sum átti vitjunartørn, tá tær vóru í Havn, men úrslitið í uppgerðini varð ikki stórvegis nervað av hesum.

Fyri triðju ferð innan eina góða viku eydnaðist nevnliga VB at skjóta fleiri mál enn neistakvinnurnar, og harvið staðfestu tær enn einaferð, at tær avgjørt ongar ætlanir hava um at lata VÍF fara framvið á stigatalvuni, har liðini í løtuni tykjast vera í hørðum tvídysti.

### Javnari

Hesa ferð var munurin millum liðini bæði tó ikki heilt so greiður, sum hann hevur verið undanfarnu dystirnar. Sæð soleiðis, at tað ikki var fyrr enn í seinastu minuttunum, at VB kundu kenna seg heilt vísar í sigrinum.

Neistin legði bragdliga fyri fyrstu løtuna, og stóran part av fyrra hálvleiki vóru tað tær, sum áttu munin. Ikki fyrr enn seinastu fimm minuttirnar eydnaðist VB at toga seg framum, men tá hetta so fyrst varð gjørt, so sleptu tær ongan tíð aftur. Leingi var munurin tó sera lítil, men tá VB um miðjan seinna hálvleik aftur økti um leðsluna, var tað sum um Neisti ikki orkaði meira. Sinniliga yvirskotið til at reisa seg aftur tykist fullkomuliga resta á liðnum, og hetta kemur til sjóndar, tá mótrákið kemur á.

Meðan tær hjá VB soleiðis framhaldandi halda fast um oddasessin, tykist Neistin hinvegin framvegis at gerast partur av niðurflytingarstríðnum, har tað fyrst og fremst ræður um at halda Tjaldur aftan fyri seg. Enn eru bert tvey stig á muni í so máta, og tí er tað av alstórum týdningi hjá Neistanum, at stig fáast úr komandi dystunum, soleiðis at vandin fyri eini annars óhugandi niðurflyting kann beinast burtur.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VB 19-23 (9-11)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Mildrið Jacobsen 6, Ása Dam á Neystabø 3, Súna Mørk 2, Susan Brockie 2(2), Simona Dziugyte 2, Christina Holm 1, Lív Sørensen 1, Rakul Augustinussen 1, Jórun Ludvig 1
**VB:** Reda Kurkauskiene 10(3), Daiva Toumaite 6, Gurið Mortensen 5, Eydis Kjærbo 1, Rannvá Augustinussen 1
**Brotskøst:** Neistin 4, VB 4
**Útvísingar:** Neistin 2
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

# Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 2 | - | 1 | 354 | 280 | 74 | 13 |
| 2 VB | 2 | 2 | - | 0 | 360 | 302 | 58 | 13 |
| 3 Stjørnan | 2 | 1 | - | 0 | 297 | 298 | -1 | 10 |
| 4 Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | 336 | 338 | -2 | 8 |
| 5 StÍF | 2 | 0 | - | 1 | 324 | 352 | -28 | 7 |
| 6 Neistin | 3 | 0 | - | 0 | 294 | 322 | -28 | 5 |
| 7 Tjaldur | 2 | 1 | - | 0 | 280 | 353 | -73 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | 405 | 323 | 82 | 11 |
| 2 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | 350 | 298 | 52 | 9 |
| 3 Neistin | 1 | 0 | - | 0 | 365 | 336 | 29 | 9 |
| 4 KÍF | 1 | 1 | - | 0 | 31 | 353 | -22 | 7 |
| 5 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | 343 | 348 | -5 | 6 |
| 6 H71 | 1 | 1 | - | 0 | 327 | 379 | -52 | 5 |
| 7 Tjaldur | 1 | 0 | - | 0 | 321 | 405 | -84 | 3 |

### Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 114 | (23) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 108 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 102 | (36) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 97 | (29) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 95 | (27) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 93 | (48) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 92 | (19) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 91 | (13) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 71 | (19) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 69 | (3) |
| Alina Olaru | StÍF | 69 | (7) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 62 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 60 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 51 | (9) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 50 | (4) |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 114 | (14) |
| Damir Oros | KÍF | 93 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 90 | (2) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 88 | (15) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 86 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 79 | (18) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 78 | (7) |
| John Zachariasen | VÍF | 72 | |
| Áki Olsen | VÍF | 64 | (5) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 58 | (12) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 56 | (10) |
| Áki Mørk | Neistin | 55 | (13) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 53 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 51 | (18) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 50 | |

### Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | sett | sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 14 | 11 | - | 3 | 37 | 14 | 23 | 15 |
| 2 ÍF | 13 | 11 | - | 2 | 37 | 15 | 22 | 14 |
| 3 TB | 14 | 10 | - | 4 | 35 | 15 | 20 | 12 |
| 4 Dráttur | 14 | 5 | - | 9 | 20 | 35 | -15 | 5 |
| 5 Fleyr | 14 | 3 | - | 11 | 13 | 35 | -22 | 5 |
| 6 KÍF | 13 | 1 | - | 12 | 8 | 36 | -28 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 11 | 10 | - | 1 | 31 | 5 | 26 | 12 |
| 2 Mjølnir | 11 | 7 | - | 4 | 23 | 16 | 7 | 9 |
| 3 Fram | 11 | 6 | - | 5 | 22 | 17 | 5 | 8 |
| 4 SÍ | 11 | 5 | - | 6 | 17 | 20 | -3 | 7 |
| 5 Fleyr | 12 | 0 | - | 12 | 1 | 36 | -35 | 0 |



Valdemar Lützen Byggibúð
Byggimarknaðurin ið ger tað léttari...

Bókhaldari

Til okkara nýstovnaða byggimarknað mitt í býnum, verður søkt eftir fólki til bókhalds- og skrivstovuarbeiði.

Tann ið setast skal í starvið, má hava hollan kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Telduskipanin Navision verður brúkt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. februar 2003

**S/pf Valdemar Lützen**
P.O. Box 20
FO-110 Tórshavn
Att: Høgni Lützen

**Byggibúðin**
Tlf. 311020
Fax. 310822
E-mail: v-lutzen@post.olivant.fo

*Fyritøkan Valdemar Lützen hevur 98 ár á baki. Góðska og góð tænasta verður altíð sett í hásæti. Umgangstónin er léttur og ein skal ikki langt fyri at fáa ein hjálpandi hond, um á stendur.*

*Okkara høvuðsgrein er smásøla v.m. Og málsetningur okkara er at økja virksemi okkara, við góðari kundatænastu og kappingarførir prísir.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Felagsinnskriving skúlaárið 2003/2004
### í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1997 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 28. ella 29. januar 2003.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **týsdagin 28. og mikudagin 29. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 254010

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Hoyvíkar skúli**
Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **týsdagin 28. januar, frá kl. 3-5 seinnapartin.** Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til Frítíðarskúlan í Snarskivuni, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 315160.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

**Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar**

## Skeið fyri felagslimum, álitisfólki og nevndarlimum innan sáttmálaøki hjá FA

Føroya Arbeiðarafelag skipar fyri skeiði fyri felagslimum, álitisfólkið og nevndarlimum, ið ikki hava verið á skeið áður.

**Hvat er skeiðið um?**
Hvat er Føroya Arbeiðarafelag?
Hvussu er føroyski arbeiðsmarknaðurin uppbygdur?
Hvat er sáttmálasamráðingar?
Hvat er eitt álitisfólk?

**Nær verður skeiðið?**
Í viku 9

**Hvar verður skeiðið?**
Í Gistingarhúsinum við Á í Øravík

**Tilmelding:**
Tilmelding er hjá limafeløgunum ella hjá FA á tlf. 312101, faks 315374, t-post: elin@fafelag.fo.

Skeiðið verður bert um nóg stór undirtøka er.

**Tilmelding í seinasta lagi 12. februar 2003.**

**Føroya Arbeiðarafelag**
Tjarnardeild 5-7
Postsmoga 56 · 110 Tórshavn
Tlf. 312101 faks 315374
t-post: fafelag@fafelag.fo

## Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður 13. apríl til 9. mai 2003. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 1. februar 2003.

Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424 179.



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Fótterapeutur

Søkt verður eftir einum autoriseraðum fótterapeuti til heimið at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er mett at vera ein dag um vikuna.

Møguleiki er fyri at hava onnur viðskiftafólk framíhjá.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Helenu Joensen, leiðara á heiminum, tlf. 332600 ella 332601.

Sosialurin -tað loysir seg